KRIMI

# Son of Sam



**Tá Son of Sam fyrstu ferð gjørdi um seg í New York um morgunin 29. juli 1976 kundi eingin vita, at ein hópdrápsmaður byrjaði yrki sítt. Men hesin »sonur Sam« skuldi gerast ein hin kendasti mordarin í amerikanskari søgu, líka kendur sum Ted Bundy og Zodiac drápsmaðurin**

**HÓPDRÁP**
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Hendan Ólavsøkumorgunin sótu tvær ungar gentur, 18-ára gamla Donna Lauria og 19-ára gamla Jody Valenti, í bilinum hjá seinnu nevndu og tosaðu, tætt við úthurðina í íbúðini hjá Donnu. Av tí at tað var so seint – klokkan eitt um morgunin – bóðu foreldur Donnu, ið júst komu heim, hana koma inn. Tað lovaði hon.

Tá foreldrini vóru farin inn, sá Donna ein mann luskandi runt, men áðrenn Jody kundi svara spurninginum um, hvør hesin maður var, kom hann fram til bilin og byrjaði at skjóta.

Donna Lauria doyði á staðnum, og hóast Jody trýsti á bilhornið, helt maðurin fram at »skjóta«, hóast eingi skot vóru eftir í revolvaranum. Jody grulvaði úr bilinum, og pápi Donnu, sum hevði hoyrt larmin, kom leypandi út, og í berum náttklæðum skundaði hann sær við bili sínum á sjúkrahúsið við teimum báðum.

Løgreglan fann einki motiv fyri gerðini, og at enda slóu teir seg til tols við, at tað var ein bandauppgerð, har tey skeivu vórðu skotin, ella at tað var ein ørlingur. Jody var so skelkað, at hon fekk ikki rættiliga hjálpt løgregluni við útsjóndini av manninum.

Tríggjar mánaðir seinni, 23. oktober 1976, feiraði Carl Denaro saman við vinum, at hann skuldi inn í flogvápnið, og at hann tí ikki fór at síggja vinir sínar aftur í longri tíð. Ein genta, Rosemary Keenan, var við á barrini, og tá fólk fóru til hús, koyrdi Carl Rosemary til hús. Tey sótu í bilinum og tosaðu, tá ein maður knappliga kom fram til síðusetrið á bilinum og byrjaði at skjóta. Carl varð illa særdur, og Rosemary, skelkað, koyrdi bilin aftur til barrina, har vinir hansara fingu hann á sjúkrahús.

Læknarnir skiftu ein part av skøltinum út við eina metallplátu, nakað ið merkti hann restina av lívinum. Hendan sama Rosemary Keenan var dóttir til ein av detektivunum, sum blivu knýttir at leitanini eftir Son of Sam.

## Álopini halda fram

Uppaftur ein mánað seinni, 26. november 1976, vóru tvær vinkonur á veg heim eftir at hava verið í biograf. Bussurin steðgaði nærhendis har onnur teirra, Joanne Lomino, búði, og tá hon sá ein mann ganga og mala, bað hon vinkonuna, Donnu DeMasi, um at skunda sær.

»Vita tit, hvar...«, byrjaði maðurin, eins og vildi hann spyrja um veg, men tók síðani ein reolvara undan jakkanum og byrjaði at skjóta eftir gentunum. Báðar vórðu raktar, og maðurin tømdi síðani revolvaran móti einum húsum.

Familjan hjá Joanne hoyrdi skotini og rópini og skundaðu sær til hjálpar og fingu genturnar á sjúkrahús. Har funnu læknar skjótt fram til, at Donna fór at sleppa óskala, men Joanne var ikki so heppin. Hon gjørdist lamin av skotunum.

Av hesum trimum álopunum var bert ein einasta kúla funnin heil, og tí hevði løgreglan ikki enn megnað at binda hesi álop saman til ein persón. Tað skuldu ganga tveir mánaðir, áðrenn tann seinni so kendi Son of Sam sló til aftur.

Beint eftir miðnátt 30. januar 1977 fór forlovaða parið Christine Freund og John Diel av The Wine Gallery í Queens, New York og yvir í bilin. Tey høvdu bara eyga hvør fyri øðrum og sóu tí ikki mannin, sum kom fram til bilin og skjeyt tvey skot inn gjøgnum rútin í høgru síðu. 26-ára gamla Christine varð rakt í høvdið av báðum skotum, og John rann eftir hjálp. Har var tó einki at gera, og Christine doyði fáar tímar seinni á sjúkrahúsinum.

Men nú var ein detektivur snarhugsin. Hann sá, at álopið var ikki framt við vanligari kúlu, og hartil líktist framferðarháttúrin álopunum á Lauria, DeMasi og Lomino. Serfrøðingar í kúlum søgru frá, at hesar vóru komnar frá vápninum .44 Charter Arms Bulldog, eitt rættiliga óvanligt vápn. Men løgreglan fann einki samband millum dripnu ofrini.

## Fleiri offur

12. mars 1977 var Son of Sam aftur upp á spæl. Ein lesandi, Virginia Voskerichian, var á veg heim, tá ein maður, ið gekk ímóti henni, knappliga tók eina skambyrsu fram og rakti Virginiu í andliti við einum skoti. Gentan doyði á staðnum.

Tá dráðsmaðurin rann avstað, kom hann framvið einum eldri manni, sum hevði sæð allan tilburðin. »Hey, hann sjálvur«, segði drápsmaðurin og rann víðari.

Men hesaferð bar so til hjá løgregluni at samanlíkna kúlur, og nú var greitt, at talan var um sama drápsmann í fleiri av førunum. Hetta førdi samstundis til, at løgreglan setti á stovn eina deild, nevnd Omega, sum skuldi finna hendan hópdrápsmannin, sum seinni skuldi fáa heitið Son of Sam.

Sum væntað hildu álopini fram. 17. apríl sótu tey ungu, 18-ára gamla Valentina Suriani og sjeikur hennara, 20-ára gamli Alexander Esau, í einum bili og tosaðu, tá ein annar bilur koyrdi upp á síðuna av teimum. Førarin skjeyt tey bæði tvær ferðir hvør og Valentina doyði á staðnum, Alexander nakað seinni. Aftur hesaferð varð nýttur ein .44 kalibur revolvari.

Men eitt annað var øðrvísi her: Eitt bræv til kanningarovastan Borrelli, har drápsmaðurin upplýsti sítt »navn«, Son of Sam.

Men tað skuldi annað - og minni - til enn dráp so líðandi at festa navnið David Berkowitz til heitið Son of Sam. Ein maður nevndur Jack Cassara fekk ein dagin eitt »góðan betring«-kort, har Sam Carr harmaðist, at hann var dottin av takinum. Tað var Jack kortini ikki, og hann setti seg í samband við Sam, ið sum vera man ikki hevði sent kortið. Hetta førdi til, at málið um ein hund, sum varð skotin, men yvirlivdi, kom í ljósmála. Hetta førdi aftur til, at sonur Cassara kom í tankar um ein undarligan mann, sum eitt stutt skifti hevði leigað eitt kamar frá teimum. Hesin var ræddur fyri hundinum, tey høvdu, og kom ongantíð aftur eftir teimum 200 dollarunum, hann hevði goldið í depositum. Hesin maðurin æt David Berkowitz.

Skjótt var kona Jack, Nann Cassara, sannførd um, at David var Son of Sam.

## Tað snarar um

26. juni 1977 um trítíðina um náttina fóru ein genta, Judy Placido, og ein drongur, Sal Lupo, heim frá einum diskoteki. Komin í bilin var Son of Sam har, men bæði vóru ógvuliga heppin. Sal varð rakt í armin, og hóast Judy var rakt tríggjar ferðir, slapp hon uttan varandi mein.

Í einum brævi, sum Son of Sam hevði sent einum blaðmanni, nevndi hann eitt offur við navni, nevniliga fyrsta offurið, Donna Lauria, sum varð myrd 29. juli 1976. Hetta fekk løgregluna at óttast fyri einum nýggjum morði á eittára degnum, men einki hendi. Og tó, tveir dagar seinni, tá løgreglan byrjaði at anda lættari, sló Son of Sam til fyri seinastu ferð.

Aftur var talan um eitt par í einum bili, Stacy Moskowitz og Bobby Violante. Bobby varð skotin tvær ferðir, Stacy einaferð í høvdið. Gentan doyði fleiri tímar seinni, meðan drongurin slapp við lívinum.

Áhugin fyri Berkowitz øktist. Hann svaraði til tað, sum løgreglan visti um Son of Sam. Tað vóru tveir vanligir løgreglumenn, sum fingu illgruna til Berkowitz, og við hjálp frá øðrum fingu teir Omegadeildina at hyggja nærri at manninum.

Men seint gekk, eisini tí deildin hevði so ómetaliga nógv spor at kanna. Berkowitz hevði eitt nú viðgingið í einum brævi til granna í sama bygningi, at hann hevði framt morðini, og kortini gingu fleiri dagar, áðrenn Omegadeildin lætst um vón.

Endiliga 10. august 1977 hevði Omegadeildin knýtt allar træðrir saman og fekk handtikið David Berkowitz. Sam Carr búði nærhendis har, ið Berkowitz búði, og við tíðini helt hann, at illir andar búði í Sam, og at tað vóru hesir, ið góvu honum boð um at drepa. Hann gjørdist tí sonur Sam, Son of Sam.

At David Berkowitz ikki var, sum hann átti, varð skjótt greitt fyri øllum. Hann viðgekk tó drápini, og bleiv í síðsta enda dømdur 365 ára langa fongsulsrevsing.

*Kelda: CourtTV - Crime Library Marilyn Bardsley*